

*Konseptbilurin Jaguar C-XF verður sýndur fram á North American International Auto Show í Detroit*

# C-XF skal avloysa Jaguar S





*C-XF er eins sermerktur innan sum uttan við t.d. nýggju tøknini, sum nevnist JaguarSense*

**Tá Jaguar S-Type verður avloystur, verður tað helst av einum bili í stíl við konseptbilin C-XF, sum í hesum døgum verður sýndur fram í Detroit. Talan verður um ein rættuliga framkomnan og sermerktan sedan**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

At Jaguar eru við at skifta stíl, er konseptbilurin C-XF besta dømi um. Bilurin verður sýndur fram fyrstu ferð á North American International Auto Show í Detroit, sum verður nú í januar.

Talan er um ein framtíðarbil sum verður sýndur fram fyri at vita hvussu hann verður móttikin á framsýningini. C-XF skal eftir ætlan avloysa núverandi Jaguar S-Type. Men nær tað verður, vita vit ikki enn.

C-XF er ein sedan við fýra hurðum. Designið er rættuliga sermerkt, t.d. eru hurðahandtøkini í stólpunum ístaðin fyri á síðunum á hurðunum, sum er tað mest vanliga.

Motorurin er ein 4,2 litur V8 við 420 hk (snúningsmoment: 500 Nm) og 6-trins automatiskum girkassa.

Bilurin verður rættuliga framkomin. Sambært fyrstu upplýsingunum um C-XF hevur hann t.d. eina nýggja teknologi, sum nevnist JaguarSense, har bilførarin hevur møguleika at aktivera ymiskar funktiónir á instrumentborðinum við bert at flyta hondina, ístaðin fyri at trýsta á knøttar.



*C-XF skal eftir ætlan avloysa núverandi Jaguar S*



*C-XF er ein sedan við fýra hurðum. Designið er rættuliga sermerkt*

